**Skjal 5**

Tygara Hátign,

Eg havi tann heiður at vísa til sáttmálan millum Schweiziska Samveldið og Kongaríkið Danmark til at sleppa undan tvískatting viðvíkjandi skattum av inntøku og fæi (kapitali) og til protokollina undirskrivað í Bern tann 23. november 1973, sum broytt við protokollunum undirskrivaðar í Keypmannahavn tann 11. mars 1997 og 21. august 2009 (hereftir víst til sum ávikavist „Sáttmálin" og „Protokollirnar") og somuleiðis til brævaskiftið frá 20. mars 1978 millum donsku stjórnina og schweiziska samveldisráðið til at víðka sáttmálan til Føroyar
(hereftir víst til sum „Víðkan I").

Samsvarandi Víðkan I varð tann orðingin av Sáttmálanum, sum var í gildi tann 20. mars 1978 víðkað til Føroyar. Ímeðan varð Sáttmálin broyttur í Protokollunum, av teimum er Protokollin undirskrivað 21. august 2009 ikki komin í gildi enn. Danska stjórnin vildi havt Sáttmálan, sosum hann er broyttur í Protokollunum, at vera galdandi millum Schweiziska Samveldið og Føroyar.

Vegna donsku stjórnina havi eg tí tann heiður at kunngera hesa víðkan sambært grein 30 í Sáttmálanum:

1. Protokollirnar verða víðkaðar til Føroyar soleiðis:
a) Protokollirnar skulu vera galdandi sum um Føroyar og Schweiziska Samveldið vóru samtykkjandi partarnir av teimum.
b) Ein og hvør tilvísing til Kongaríkið Danmark ella til Danmark í Protokollunum skal skiljast sum ein tilvísing til Føroyar, um so er, at samteksturin ikki ber nakað øðrvísi við sær;

Hansara hátign
Harra Viktor Christen
Sendiráðharri fyri Schweiz

c) Yrkisorðið „málsráðandi myndugleiki" merkir í Føroyum fíggjarmálaráðharrin ella hansara heimilaða varafólk ella myndugleiki, sum er tilskilaður sum fullgildur myndugleiki til endamálið við hesari avtaluni.(hereftir víst til sum „Víðkan II").
2. Víðkan 2 skal koma í gildi, tá protokollin millum Schweiziska Samveldið og Kongaríkið Danmark undirskrivað tann 21. august 2009 fær gildi.
3. Víðkan II skal verða verandi í gildi so leingi sum Víðkan I er galdandi. Víðkan II kann verða uppsøgd annaðhvørt av donsku stjórnini ella schweiziska samveldisráðnum, gjøgnum sendiráðharrasambond, við fráboðan um uppsøgn í minsta lagi seks mánaðir fyri árslok av einum og hvørjum álmannakkaári. Í tílíkum føri skal Víðkan II hava virknað fyri seinastu ferð:
a) viðvíkjandi skattum eftirhildnum við kelduna fyri upphæddir, sum falla til gjaldingar í tí álmanakkaaárinum, har uppsøgnin varð givin við árslok;
b) viðvíkjandi øðrum skattum í Føroyum á inntøku og fæi (kapitali) á skattum útskrivaðir fyri tað álmanakka árið, har uppsøgnin varð givin við árslok;
c) viðvíkjandi øðrum schweiziskum skattum á inntøku og fæi (kapitali) á skattum útskrivaðir fyri tað álmanakkaárið, har uppsøgnin varð givin við árslok;

Um uppskotið um Víðkan II verður góðkent av schweiziska samveldisráðnum, havi eg eisini tann heiður at skjóta upp, at hetta brævið og svarið frá tygara hátign í tann mun skal verða uppfatað sum at ein avtala er gjørd millum tær báðar stjórnirnar sambært grein 30 stykki 1 í sáttmálanum.

Taki við, tygara hátign, endurtiknu vissuni um mína størstu hávirðing

Kristian Jensen